# Havleikur

*Myndir Magnus Gunnarson*

**Í farnu viku varð fólkadansistevnan "Havleikur" hildin í høvuðsstaðnum við luttøku av umleið 400 dansifólki úr Norðurlondum og umleið 300 føroyskum dansarum. Stevnan varð sett av løgmanni á Vaglinum og eftir tað varð dansað í Norðurlandahúsinum umframt fleiri staðni í Havnini. Tað var Sláið Ring, sum skipaði fyri hesi øðvísi og serstøku danisstevnuni, ið eydnaðist stak væl. Sosialurin fylgdi glaðu dansifólkunum, tá tey dansaðu kring Havnina seinasta leygardag.**

















